

# lærlingur til slaktara

MIKLAGARÐUR Í SMS SÓKNAST EFTIR EINUM ELLA TVEIMUM SLAKTARALÆRLINGUM AT BYRJA 1. AUGUST 2003

Í lærutíðini kemur tú at arbeiða hjá slaktarinum í Miklagarði í SMS og fært høvi at royna eitt sindur av hvørjum.

- Lærutíðin er 4 ár. Av hesum er 1 ár skúlagongd í Danmark.

Eitt læripláss hjá slaktarinum gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari menning og tínir framtíðarmøguleikar eru fleiri.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn - innan 14. juli 2003 - við møguligum prógvum og tilmælum til Miklagarð. Tú kanst eisini seta teg í samband við Jørgen Jørgensen á tlf. 31 52 62, um tú vilt hava meira at vita um útbúgvingina.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1.700 fermetrar og við meira enn 10.000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.*
*Sláturdeildin í Miklagarði er ein av størstu handilssláturdeildunum í danska kongaríkinum.*

MIKLAGARÐUR

SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11

petur & petur • 320870


# Jazzfestivalurin 20 ár

**Týsdagin byrjar Tórshavnar Jazz-, fólka, og Bluesfestivalurin, sum í ár hevur 20 ár á baki. Øll árini hevur tað verið the grand old man, Brandur Øssursson, sum hevur skipað fyri. Fríggjadagin verður hann við í ungdómsorkestri sínum frá 1950 á konsert í Tilhaldinum**



*Irving Anckers Sekstet í 1950…*

JAZZFESTIVALUR
*Eirikur Lindenskov*

Hetta er triða árið, at dentur hevur verið lagdur á at, at tónleikurin eisini er niðri í miðbýnum.

Eitt av serligu tiltøkunum hesaferð verður fríggjadagin, tá ungdómsorkestrið hjá Brandi frá Keypmannahavn í 1950 fer at spæla í Tilhaldinum í Havn. Hetta orkestrið kallaðist Irving Anckers Sekstet, og Brandur hevur savnað allar tónleikararnar til hesa serligu jubileumskonsertina.

Søgan um orkestrið byrjaði tann 4. februar í 1950, tá seks næmingar á Østersøgades Gymnasium á Østerbro í Keypmannahavn gjørdu av at stovna amatørjazzbólkin.

– Vit seks skúlafelagar spældu saman frá byrjan, og ljóðførini vóru piano, bass, trummur, sopransax, trompet og klarinet, greiðir Brandur Øssurson frá. Seinni varð sopransaxin skift út við eina tenorsax og leiðarin í orkestrinum, Irving Ancker, sum spældi upp á klarinettina, fekk sær síðani eina altsax.

– Irving Anckers Sekstet, sum orkestrið kom at eita, fekk skjótt vind í seglini og spældi umframt til skúlaveitslur og jazzkonsertir á okkara egna skúla eisini til skúlaveitslur á fleiri øðrum skúlum, so sum Aurehøj Gymnasium, har okkara egni Knud Heinesen var formaður í næmingaráðnum, greiðir Brandur frá. Teir spældu eisinni á skúlunum í Birkerød, Gentofte og var annars við í fleiri barna- og ungdómssendingini Ugerevyen í tí, sum tá æt Statsradio.

Irving Anckers Sekstet var fyrst í fimmtiárunum eisini fæst húsaorkestur í Borgernes Hus í Rosenborggade, nærindis Nørreport.

Eftir soleiðis at hava spælt í eini tvey ár, varð bólkurin uppfloystur, og tríggir av limunum gjørdust professionellir tónleikarar, meðan hinir tríggir fóru í aðrar vinnur.

Tá tað vóru liðin fimmti ár síðani at orkestrið varð stovnað, tók Irving Ancker stig til at savna gomlu manningina aftur eftir henda heldur langa steðg, og teir seks samdust um at byrja umaftur – bara til stuttleika.

– Síðani hava vit hitst 14. hvønn dag í Musikkhandlinum hjá Ejvind Christensen á Jernbanepladsen í Lyngby, sum ikki bara leggur høli til, men eisini so mangt annað, sigur Brandur Øssursson.

Tey, ið vilja hoyra henda gamla bólkin, kunnu leita sær í Tilhaldið í Havn komandi fríggjadag.

Hesi 20 árini, Brandur hevur skipað fyri Jazzfestivalinu, hava um 400 orkestur/solistar vitjað festivalin – tilsamans yvir 3.000 tónleikarar.

Men fer Brandur so at halda fram í 20 ár afturat?

– Tað fáa vit at síggja, eg taki eitt ár í senn, sigur hann smílandi.

Vit frætta meira um festivalin í næstu viku.



*…og Irving Anckers Sekstet í 2002. Brandur Øssurson var ein av teimum seks sum stovnaðu bólkin Irving Anckers Sekstet í 1950. Bólkurin var virkin í eini tvey ár. Í 2000 savnaðu teir bókin aftur, og fríggjadagin hevur hann konsert í Tilhaldinum í Havn.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri pápabeiggi, abbabeiggi og svágur

**Margeir Trønd Hansen**
vanliga nevndur Trøndur

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri blómur og kransar og til tykkum,
ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Jan, Sámal, Sigurð og Sólgerð v/ familjum**

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá ið pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Tamar Samson**

doyði og varð jarðaður.

**Jensa, Martin og Annelisa**

## Tøkk

Vit takka øllum tykkum, sum vístu okkum samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Oda Kjølbro**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til heimahjálparar,
Umlættingarheimið og til tykkum øll á Lágargarði,
sum ansaðu og høvdu so stóra umsorgan um hana
á tykkara serliga kærleiksfulla og vinarliga máta.
Tit gera eitt dygdarverk og ongum nýtist at ótta elli
um ein kemur á Lágargarð.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við jarðarferðini,
tøkk til brøðrasamkomuna við Birga Andreasen,
Svenning av Lofti, Jóanes Poulsen, organisti og fleiri.
Tit settu eitt vakurt minni um mammu okkara.
Takk fyri kransar, blómur og gávu til Lágargarð.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

**Anders og Karin-Maria við familju**




**Maersk Air letur upp í nýggjum hølum í Handilskjarnanum í Tórshavn**
**Vit lata hurðarnar upp týsdagin tann 1. juli, kl. 9.00 við morgunkaffi, undirhaldi, kappingum og einari rúgvu av góðum tilboðum.**

# Stór upplatingarveitsla

## UPPLATINGARTILBOÐ

Danmark fyri Maersk Air-prísir.
Verður selt frá týsdegnum 1.juli
til fríggjadagin 4.juli.

Ferðingartíðarskeið upp til 4 dagar.
**FØROYAR-KEYPMANNAHAVN** kr. 1.595,-
**FØROYAR-BILLUND** kr. 1.633,-

Ferðingartíðarskeið upp til 14 dagar.
**FØROYAR-KEYPMANNAHAVN** kr. 2.095,-
**FØROYAR-BILLUND** kr. 2.133,-

Heimferð í seinasta lagi tann 26. oktober 2003. Serstakar treytir og avmarkað av plássum eru. Hygg inn í okkara nýggja handil ella set teg í samband við tína ferðavinnuskrivstovu.

## SKRÁ FYRI 1. JULI 2003

**KL. 9.00: KØTILBOÐ**
1 Ferðaseðil t/r úr Føroyum til ein av hesum býum:

Keypmannahavn ella Billund, **kr. 100,- per bý**

Amsterdam, Athen, Barcelona, Bruxelles, Frankfurt, Kristiansand, London, Lissabon, München, Paris, Stockholm og Venedig, **kr. 1.000,- per bý**

*Tilsamans eru 14 ferðaseðlar tur/retur. Tað kann bert keypast ein ferðaseðil pr. persón.*

**KL. 9.30: LUTAKAST**
5 Ferðaseðlar Føroyar–Danmarkar tur/retur.
Fá ein lutaseðil í handlinum.

**KL. 12 - 14 - 16: VINNINGARSKOT**
Kanónin verður skotin uttanfyri handilin.
Nógvir góðir vinningar

**BALLÓNIR OG GÓÐGÆTI TIL BØRNINI**

**GITA OG VINN**
Hvussu nógvir modell flúgvarir eru í glasbúrinum?

## Vit eru í veitsluhýri – kom við!

Vitja eisini okkara nýggja handil á
**www.maersk-air.fo**

Handilskjarnin, 110 Tórshavn · Telefon 35 74 74 · Telefax 35 74 75

MAERSK AIR
It's got to be perfect